VÍF-Kyndil 29-22 (11-11):

# Eitt korter var nóg mikið



*Í ein hálvleik eydnaðist Kyndli at halda VÍF, men fyrstu løtuna av seinna umfarinum stóð mest sum stilt hjá gestunum, meðan heimaliðið við kvikum álopsspæli sópaði mótstøðuna til viks*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í eitt lítið korter sýndi VÍF, hví liðið verður roknað sum ein av gullfavorittunum, og tað var nóg mikið til at basa einum Kyndils-liðið, sum ikki tóktist hava neyðuga treystið**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir eina heldur skrumbluta viku, var tað nú ramasta álvara hjá VÍF, um tær framvegis skuldu gera sær vónir um at vera partur av gullstríðnum. Ein javnleikur á Skála og tap í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini mundi í øllum førum ikki vera tað, sum guli herurin hevði ætlað sær at fingið burtur úr vikuni.

Hetta hevði eisini av nýggjum sátt nakað av iva um, hvørt VÍF kundi megnað setningin um at verja gullmerkini frá í fjør. Ikki minst var tað hesin spurningurin, sum nú skuldi svarast móti einum Kyndils-liðið, sum seinastu mánaðirnar hevur havt eina støðugt hækkandi formkurvu. Og ikki minst, so hevði Kyndil longu undan hesum vunnið tvær reisur á VÍF í kappingarárinum.

## Vunnu seg íaftur

Fyrstu løtuna av dystinum sunnudagin var eisini nógv, sum bendi á, at Kyndil aftur ætlaði at arga VÍF. Nærum fimm minuttir gingu, áðrenn VÍF yvir høvur slapp framat í málskjótingini, men so gekk tað eisini skjótt fyri seg. Eftir at Kyndil hevði verið á odda 2-0 fyrstu løtuna, broyttist máltalvan so líðandi, til tað brádliga stóð 8-3.

Og VÍF helt áfram við ágangandi spælinum. Leikarnir dugdu fyrst og fremst at vera tolnar í verjuspælinum. Sjálvandi alla tíðina ágangandi, men samstundis so, at bíðað varð eftir mistøkunum, sum so kundu revsast. Og var tað ikki fyri eina sera væl leikandi Fríðu Petersen í Kyndils-málinum, so kundi revsingin væl verið eitt svíðandi stórtap.

Mongu bjargingarnar hjá bóru tó tvey úrslit við sær. Annað var, at vestmannagenturnar gjørdust alt meira altráðar eftir at skora, nú møguleikarnir komu so lætt. Og hitt var sjálvandi, at væntandi VÍF málini góvu Kyndil høvi til at koma inn aftur í dystin.

Og hesum tóku tær eisini av. Eitt mál fyri og annað eftir fór sendandi inn um Manuelu Stan, soleiðis at Kyndil við at vinna seinastu 10 minuttirnar 7-1 vann seg uppaftur á javnleik, áðrenn farið varð til steðgin.

## Gylt korter

Tað er altíð ymiskt, hvussu steðgurin gagnast ymsu liðunum. Fyri Kyndil hevði ivaleyst verið betri, um eingin steðgtur var í Vestmanna, tí har var alt broytt, tá liðini byrjaðu aftur.

Gott nokk var Kyndil á odda tvær reisur fyrstu minuttirnar, men so gekk galið. Vestmannakvinnurnar fingu aftur glið á væl kenda kontraspælið, og hesaferð spældi ikki so væl av hjá gestunum, sum tað hevði gjørt í fyrra.

Eina ferð fyri og aðru ferð eftir buldraðu VÍF mótálopini oman móti Kyndils málinum, og tá Fríða nú heldur ikki megnaði at standa ímóti, var tað sum um Kyndil púrasta gav skarvin yvir. Seinasti neistin til at venda dystinum var snøgt sagt ikki til staðar, og tó at VÍF sum frá leið setti ferðina nakað niður, so megnaði Kyndil ongan tíð at svara aftur. Gylta korterið fyrstu løtuna av seinna hálvleiki var var snøgt sagt nóg hjá VÍF, sum við hesum hildu fast um sessin í oddinum, har tær framvegis eru ájavnar VB.

## Viljin avgerandi

Stóri spurningurin er so sjálvsagt, hvørt VÍF megnar at hanga fast í oddinum, og fyri tað mesta hava tær svarið til hetta sjálvar. Tá lagið er hitt rætta, er tað neyvan nakað lið í landinum, sum stendur teimum kurl, og eitt nú var hetta sjónligt, tá tær so dyggiliga góvu VB durðafjórðingin í seinasta dystinum í grundspælinum.

Hinvegin hevur liðið eisini havt fleiri svartar dagar í ár. Svartir dagar, sum so avgjørt ikki hava verið eyðkennið hjá liðnum seinnu árini. Og nógv veldst um, hvussu nógvir hesir verða í tali. Og ikki minst, so veldst eisini um, hvussu lagið á leikarunum er, tá mótstøðuliðið eitur VB. Tað ger tað í øllum førum tvær ferðir afturat hetta kappingarárið. Fyrstu ferð um eina viku, tá VB kemur til Vestmanna.

Hjá Kyndli má staðfestingin eftir dystin vera, at nú eru tað fyrst og fremst bronsuheiðursmerkini, sum tað snýr seg um. Og her átti liðið at havt góð kort.

Í øllum førum man hópurin teljast millum teir avgjørt sterkastu og breiðastu í landinum, og tí tykist tað eina mest vera ein spurningur um, hvussu langt leikararnir sjálvar vilja røkka. Í Vestmanna tóktist viljin at vinna ikki vera nóg stórur, og tað er fyrst og fremst, sum tær skulu broyta, um tær vilja ota seg longur upp eftir talvuni.

## Dysturin í tølum

VÍF-Kyndil 29-22 (11-11)
**Málskjúttar:**
**VÍF:** Nicoleta Radu 8, Soley Mikkelsen 7(2), Jacklin Durhuus 5, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 4, Alis Høghamar 3, Manuela Stan 1
**Kyndil:** Lotte Sørensen 7(2), Iliana Manolescu 6(3), Annika Ljósstein 3, Jensia Petersen 3, Sonja Smiljic 1, Randi Wardum 1, Hildur Mikkelsen 1
**Brotskøst:** VÍF 3, Kyndil 6
**Útvísingar:** VÍF 2, Kyndil 2
**Dómarar:** Trygvi Mortensen & Kári Hansen.



VÍF-.Kyndil 26-24 (14-14)

# Dýrir minuttir

**Fyri tað mesta var talan um sera spennandi dyst í Vestmanna sunnudagin, men tá Kyndil eitt skifti í seinna hálvleiki gloymdi at hugsa, tóku vestmenningar av, soleiðis at sigurin kundi tryggjast**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Klassikarin í føroyskum hondbólti verða dystirnir millum VÍF og Kyndil aloftast róptir, og tó at hesir dystir ikki hava verið so javnir seinnu árini, so hevur áhugin kring uppgerðirnar altíð havt stóran áhuga. Ikki minst tí talan aloftast hevur verið um dramatiskar dystir, har hvør einasti leikari gevur alt, sum hann hevur í sær.

Eftir eitt ár til gloymibókina er nú eisini líkt til, at Kyndil í ár aftur hevur fingið eitt lið, sum kann spæla við, tá dystir eru ímóti teimum stóru. Nakað sum eisini kom til sjóndar í grundspælinum, tá seinni dysturin millum liðini endaði við javnleiki.

## Tvungið skifti gagnaði

Og tað var eisini sera javnt fyri tað allar mesta, tá risarnir so aftur hittust í Vestmanna sunnudagin. Við eini lívligari áskoðarafjøld í rygginum var so avgjørt ikki líkt til, at Kyndil bara uttan víðari var komið til Vestmanna fyri at geva seg yvir.

Heldur royndu teir frá fyrsta bríksli við ágangandi verjuspælið at gera sítt til, at tungu skjúttarnir hjá VÍF ikki skuldu koma fyri seg, og við einum VÍF liði, sum framvegis er uttan Áka Olsen, og har Ingi Olsen ikki var meira enn hálvur hendan dagin, átti eisini at verið møguleiki fyri, at hetta kundi geva úrslit.

Tað at júst teir báðir Olsen menninir at kalla ikki vóru við hjá VÍF, gjørdi tó sítt til, at spælið var nakað umskipað, og soleiðis sum Kyndil spældi, so var umskipanin helst eisini gagnlig. Við Daniel Rápa á øðrum bakplássinum varð denturin nevnliga í nógv størri mun lagdur á innspælingarnar av bakkinum, heldur enn at tveita kanónkúlur móti málinum, og tí mátti Kyndil ansa sær, soleiðis at verjan ikki gjørdist alt ov framrættað royndunum at steðga fyrst og fremst Piti Negru og Áka G. Olsen. Oftani var tað eisini ein fragd at síggja, hvussu Rápa bara sletti bóltarnar inn um Kyndils-verjuna til frían viðleikara, meðan grønu menninir væntaðu okkurt heilt annað.

## Mistu høvdið

Hinvegin so var Kyndil als ikki fyri ongum. Allan fyrra hálvleik fylgdu teir sera væl við, og tó at VÍF eitt skifti hótti við at rýma, so varð hetta ikki loyvt teimum. Yvirgongdirnar av serstakliga vinstra bakki vóru fleiri í tali, og ikki minst eftir at ein væl upplagdur Høgni Klein kom á vøllin, tóktist teir grønu veruliga at reisast.

Tað var eisini ein vilji á Kyndils-liðnum, sum sjáldan er sæddur í ár. Sjónligt var, at hetta var ein dystur, sum skuldi og mátti vinnast, og at við eitt sindur meira av umhugsni kundi hetta eisini eydnast hjá teimum.

Eitt stórt korter miðskeiðis í seinna hálvleiki mundi tó vera fremsta orsøkin til, at hetta kortini ikki eydnaðist hjá Kyndli. Eftir at teir høvdu lagt væl í seinna hálvleiki, var tað ístaðin VÍF, sum byrjaði at toga avstað. Munurin gjørdist kanska ikki so stórur, men tá Kyndil samstundis tveitti alt umhugsni fyri borð, fekk VÍF skapt avgerandi holið.

Hóast teir tá vóru aftan fyri við tveimum og trimum málum, so var eingin orsøk til panikk hjá Kyndli, sum framvegis hevði einar tíggju minuttir at bøta skaðan í. Panikkur er tó helst mest beinrakna orðið. Skundandi og tankaleyst royndu teir at trýsta ferðina upp í topp, soleiðis at tað mista kundi vinnast innaftur, men sjálvir megnaðu teir ikki at fylgja við í hesum, soleiðis at VÍF ístaðin kundi gera sær dælt av mistøkunum. Fimm minuttir fyri leiklok hevði VÍF soleiðis fingið munin upp í fýra mál, og so var ikkii stórvegis hjá Kyndli at gera. Nakað av spenningi fekst tó í aftur, tá teir eftir eitt time-out gjørdu av at fara heilt út á vøllin eftir vestmenningunum, men nærri enn tveimum málum komu teir ongantíð.

## Væntandi royndir

Soleiðis vóru tað kanska royndirnar, sum vóru á muni á liðunum báðum hendan dagin, tó at tað kanska ikki akkurát eru tær royndirnar, sum verða settar í samband við dystartal, sum tosað verður um.

Heldur er tað tað at kunna halda høvdið kalt, tá tættir dystir nærkast avgerðini, sum var munurin hesaferð. Gjøgnum eina hondbóltstilveru í oddinum av føroyskum hondbólti vita vestmenningar helst betri enn nakar annar, hvussu slíkar støður skulu avgreiðast, og hetta sást eisini aftur í, at tað ikki eina tí einastu ferð tóktist vera nakað sum líktist ráðaloysi á VÍF-liðnum.

Teir koyrdu alla tíðina sítt egna spæl, soleiðis sum avrátt varð undan dystinum, og tað er ikki óhugsandi, at hevði Kyndil gjørt tað sama, so kundi úrslitið á máltalvuni verið eitt annað.

Umframt dýra lærupeningin við omanfyrstandandi royndunum, so mugu teir í Kyndli helst eisini ásanna, at tað undir ongum umstøðum verður til meira enn bronsumerki fyri teirra viðkomandi í ár. Skuldi talan gerast um meira, so var helst neyðugt við tveimum stigum í Vestmanna. Enn hevur liðið tó ikki mist alla vón um gull í ár, tí framvegis eru teir mest sum vissur partur av steypafinaluni, har mótstøðuliðið verður antin VÍF ella StÍF

VÍF hevur kanska verru kortini á hondini í so máta, nú teir skulu á Skála við einum máli aftan fyri til seinnu hálvfinaluna, men hóast hetta, so hava teir neyvan heilt mist mótið. Ikki minst man tað kennast fløvandi, at breiddin á liðnum hevur roynst somikið væl seinastu dystirnar. Dystir, har VÍF hevur verið nakrar av bestu leikarunum í landinum fyriuttan, men har teir framvegis halda fast í oddinum, eins og møguleikin fyri eini steypafinalu framvegis er til staðar.



*Hóast hann var afturkomin til landið, so var leikluturin hjá Inga Olsen sera avmarkaður sunnudagin, og tí varð aftur hesa ferð løgd stór ábyrgd á Áka G. Olsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Dysturin í tølum

**VÍF-Kyndil 26-24 (14-14)**
Málskjúttar:
VÍF: John Zachariasen 5, Petur Frank Joensen 5, Daniel Rápa 4, Áki G. Olsen 4, Ingi Olsen 3(1), Piti Negur 3(1), Ólavur Brimnes 2
Kyndil: Jacob Jónsson 8(1), Høgni Klein 4, Janus Einar Sørensen 3, Finnur Hansson 3, Hans Áki Dal-Christiansen 3(1), Heini Bendtsen 2, Ken Zachariasen 1
Brotskøst: VÍF 3, Kyndil 2
Útvísingar: VÍF 3, Kyndil 4
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen: Hóast talan var um eina intensa uppgerð, so megnaðu dómararnir væl at stýra spælinum, soleiðis at talan ongan tíð gjørdist um teir heilt ógvusligu nærdystirnar.